# Landsstýrið fer til ST

*Eftir samráðingarfundin hóskvøldið er greitt, at danska stjórnin stendur púra fast við, at Føroyar ikki fáa longri skiftistíð enn fýra ár. Landsstýrið fer nú at venda sær til ST*

John Johannessen
Úr Keypmannahavn

Landsstýrið fer nú at kann møguleikan fyri at fáa ein triðja part upp í samráðingarar um ríkisrættarligu støðuna.

–Vit fara at venda okkum til ST fyri at kanna, hvørjar møguleikar vit hava fyri at fáa ein triðja part upp í samráðingarnar, sigur Høgni Hoydal, landsstýrismaður.

Hesa avgerð hevur landsstýrið tikið, eftir at danska stjórnin á samráðingarfundinum hósdagin sýtti fyri at samráðast um eina skiftistíð, ið verður longur enn fýra ár.

– Vit taka hetta stig, tí vit halda, at tað nú er greitt, at talan ikki er um samráðingar millum tveir javnbjóðis partar. Danska stjórnin hevur staðfest, at hon ikki vil halda avtaluna frá 1998 og aðrar munnligar avtalur um, at vit skulu samráðast um eina búskaparliga skiftistíð, ið miðar ímóti at byggja upp ein sjálvberandi føroyskan búskap, sigur Høgni Hoydal.

Landsstýrið hevur kortini ikki tikið støðu til, um tað fer at kæra stjórnina fyri avtalubrot.

–Vit vilja helst sleppa undan sjónleiki í hesum málinum, sigur Høgni Hoydal.

**Sópaðu útspælið til viks**

Nýggja útspælið frá landsstýrinum til búskaparliga skiftistíð var á samráðingarfundinum hóskvøldið sópað til viks av donsku stjórnini.

Landsstýrið skjeyt upp, at skiftistíðin skal vera 15 ár, men at møguligar oljuinntøkur skulu mótroknast blokkstuðulinum, tá tey fyrstu fýra árini eru liðin.

Men danska stjórnin heldur tað als ikki vera neyðugt við eini skiftistíð, ið er longri enn fýra ár, tí føroyski búskapurin er longu tryggjaður.

**Blokkurin kann rúka alt fyri eitt**

Danski forsætisráðharrin, Poul Nyrup Rasmussen, vísti á tíðindafundinum eftir samráðingarnar á, at útrokningar vísa, at føroyska samfelagið væl hevði tolt, at blokkstuðulin varð tikin av beinan vegin.

– Mistu føroyingar blokkstuðulin í morgin, hevði Føroyar framvegis verið eitt vælferðarsamfelag á hædd við Skotland, eitt sindur verri enn Bretland, men við einum livistøði, sum hevði verið tvífalt tí í Portugal, segði Poul Nyrup Rasmussen á tíðindafundinum eftir samráðingarnar.

Tískil sigur danski forsætisráðharrin seg ikki hava samvitsku mótvegis donsku veljarunum at geva føroyingum eina skiftistíð á 15 ár, sum er púra óneyðug.

**Ákærir Nyrup fyri avtalubrot**

Landsstýrið er ikki samt við sjónarmiðunum hjá donsku stjórnini. Landsstýrið metir tað nevniliga vera avgerandi neyðugt at fáa eina skiftistíð á 15 ár, so at føroyski búskapurin fær stundir at venja seg av við stuðulin úr Danmark.

Í hesum sambandi vísir landsstýrið eisini á, at tað tann 10. juni 1998 gjørdi eina avtalu við donsku stjórnina, ið millum annað sigur, at partarnir skulu samráðast um eina búskaparliga skiftistíð, ið hevur til endamáls at byggja upp ein sjálvberandi føroyskan búskap.

Avtalan er seinni samtykt bæði í fólkatinginum og í løgtinginum.

Hesa avtalu metir landsstýrið, at danska stjórnin heilt klárt hevur brotið, tá hon ikki vil samráðast um eina skiftistíð, ið er longur enn tey fýra árini.

Landsstýrið tulkar støðuna nevniliga sum, at danska stjórnin ikki vil samráðast um eina búskaparliga skiftistíð, ið hevur til endamáls at byggja upp ein sjálvberandi føroyskan búskap.

Heldur ikki vil danska stjórnin, at sett verður ein felags nevnd at kanna faktuella grundarlagi fyri, hvat kravt verður av skiftistíðini, fyri at hon skal vera í tráð við avtaluna frá 1998. Danski forsætisráðharrin vísir á, at avtalan verður fylgd, tí føroyski búskapurin heilt vist er sjálvberandi um fýra ár.

Hetta ger, at landsstýrið vil hava ein triðja part upp í samráðingarnar.

Men tí hevur danska stjórnin eisini blakt víst aftur. Grundgevingin er, at danska stjórnin metir ikki, at ein triðji partur hevur førleika til at seta seg inn í viðurskiftini landanna millum og koma inn í samráðingarnar. Eisini heldur hann, at talan ikki er um ein altjóða spurning, men um eitt mál, ið skal loysat innan fyri ríkisfelagsskapin.



*Høgni Hoydal, landsstýrismaður*

# Stjórnin segði kortanei til oljuna

*Nýggja uppskotið hjá landsstýrinum um ein búskaparliga skiftistíð varð sópað til viks av donsku stjórnini. Nyrup vildi ikki hoyra talan um oljumilliónir úr Føroyum*

Eyðun Klakstein úr
Keypmannahavn

Landsstýrið fekk ikki donsku stjórnina at bíta á nýggja agnið, sum føroyska sendinevndin hevði við á fundin í Keypmannahavn hósdagin.

Undan triðja samráðingarumfarinum hevði landsstýrið gjørt eitt nýtt uppskot um búskaparliga skiftistíð, har møguligar oljuinntøkur skulu mótroknast í blokkstuðlinum.

Uppskotið, sum skuldi tryggja føroyingum eina betri skiftistíð, var fyrstu ferð lagt fyri donsku stjórnina á samráðingarfundinum hósdagin.

Donsku embætismenninir høvdu als ikki hoyrt um nýggja uppskotið frammanundan, og tá ein av embætismonnunum kom út úr samráðingarhølunum og varð spurdur um, hvat hann helt um nýggja uppskotið, stóð hann spyrjandi. Hann hevði als ikki hoyrt um uppskotið, men fekk tað síðani frá einum av donsku fjølmiðlafólkunum.

**Stjórnin stóð fast við sítt**

Nýggja uppskotið hjá landsstýrinum mælti til, at blokkstuðulin skal minka stigvíst í 15 ár. Um Føroyar fáa stórar oljuinntøkur innan hesin 15 árini, skal tann stuðulin, sum er latin eftir tey fýra árini, metast sum eitt lán, sum skal gjaldast aftur.

- Uppskotið hjá landsstýrinum vil bæði við og uttan oljuinntøkur hava við sær stórar sparingar fyri statskassan, sigur landsstýrið í viðmerkingunum til uppskotið.

Men landsstýrið fekk onga undirtøku fyri nýggja uppskotinum hjá sær. Danska stjórnin vildi ikki hoyra talan um at taka oljuna við í búskaparligu skiftistíðina.

- Vit halda ikki, at tað er rætt at blanda oljuna upp í hesar samráðingar, segði Poul Nyrup Rasmussen á tíðindafundinum eftir samráðingarnar.

- Vit hava sagt í eitt hálvt ár, at skiftistíðin verður ikki longri enn fýra ár, og tað halda vit fast við. Vit kunnu ikki gera nakað annað mótvegis danska fólkinum og flokkunum í Fólkatinginum, sigur danski forsætisráðharrin.



*Poul Nyrup Rasmussen, forsætisráðharri og Anfinn Kallsberg, løgmaður á tíðindafundi í forsætiusmálaráðnum hóskvøldið*

**Vildu vísa vilja**

Tá Anfinn Kallsberg, løgmaður, á tíðindafundinum varð spurdur um, hví landsstýrið nú hevði tikið oljuna við í samráðingarnar, svaraði hann, at landsstýrið royndi at vísa tann neyðuga viljan og fleksibilitetin til at koma víðari í samráðingunum um skiftistíðina.

Men í samráðingaruppleggingum, sum danska stjórnin fór á fundin við, varð gjørt greitt, at stjórnin ikki vildi taka undir við eini skiftisskipan, sum var tengd at gongdini í føroyska búskapinum.

- Hetta hevði verið í stríð við prinsippið um, at fullveldi og búskaparlig ábyrgd fylgjast, segði stjórnin á fundinum við landsstýrið.

Og við greiða boðskapinum hjá Nyrup og hansara fólkið varð nýggja uppskotið hjá landsstýrinum sópað til viks, áðrenn nakrar veruligar samráðingar komu í lag um tað.

Danska stjórnin stendur sostatt rimmarfast við tað, sum hon áður hevur sagt um skiftistíðina. Hon verður í mesta lagi fýra ár og verður ikki tengd at gongdini í føroyska búskapinum.






Seinastu árini hava keyp og søla av virðisbrøvum staðið í støðugum vøkstri. Hesum vøkstri vil Kaupthing nú bjóða tær at verða við í. Vit eru altíð kunnaði um nýggjar møguleikar, og kunnu tí altíð veita hollastu ráðgevingina. Tosa við okkum og vit finna í felag eina loysn, ið hóskar til júst tín tørv.

KAUPTHING
FØROYAR · ÍLØGUBANKI
Tinghúsvegur 14 • Tórshavn
Tel 351500 • Fax 351501
www.kaupthing.com

SANSIR TEL 355355